# Agnar vann sms-kapping







*Agnar Jógvanson, Jónley á Lømansbø og Diana Joensen vunnu ávikavist 1., 2., og 3. virðisløn í sms-yrkingakappingini*



*Stigtakararnir Kim Simonsen og Ole Wich fegnaðust um góðu undirtøkuna av sms-yrkingakappingini. Fleiri av yrkingunum eru prentaðar í nýggjasta Outsider Magazin*



*Eitt sera forvitnisligt rap innslag var eisini at hoyra á móttøkuni á Dimmalætting leygardagin*

**Tað gjørdist Agnar Jógvanson, ið vann sms-yrkingakappingina, ið er tann fyrsta av sínum slag í Føroyum. Heili 168 yrkingar komu inn til kappingina**

MENTAN
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Á Outsider Magazin hava tey havt nógv jørn í eldinum í seinastuni. Á móttøku á Dimmalætting leygardagin varð nýggjasta útgávan av Outsider løgd fram umframt yrkingasavnið "Náðisólin, sum blaðstjórin Kim Simonsen júst hevur givið út. Men gestirnir til móttøkuna bíðaðu ikki minni spentir at hoyra, hvør hevði vunnið sms- yrkinginakappingina "YrkFozt", sum Outsider Magazin, Ole Wich og Petur Pólson tóku stig til fyrr í ár við stuðli frá Dimmalætting og Kall.

### Strangir peikifingrar og dansandi tumlar

Heili 168 yrkingar komu inn til kappingina, og tá av tornaði vórðu tríggir vinnarar funnir. 3. virðisløn fór til Dianu Joensen, 2. virðisløn fór til Jónley á Løgmansbø meðan Agnar Jógvanson vann fyrstu virðisløn.

Kim Simonsen sigur, at eitt av endamálunum við kappingini hevur verið at lokka fólk, sum annars ikki høvdu torað tað, at senda inn hetta slagið av yrkingum

– Soleiðis var kappingin eisini ein roynd at skilja teirra málsligu kotur, heldur enn at fordøma teirra kryptearaða kjatt- og smsføroyska mál, sigur Kim, og leggur afturat, at tað kann gott vera at sambært PISA duga føroyskir ungdómar ikki so væl í skúlanum og keða seg illa. Hendan kappingin hevur hinvegin víst eitt ótrúligt hegni at uppfinna eitt garrvilt føroyskt skriftmál.

Ole Wich hevur í hesum sambandi fleiri ferðir víst á vandan í, at føroyskur málpolitikkur er vorðin so avmarkaðin, at fólk aftra seg við at orða seg alment.

– Hvat hjálpa strangir málsligir peikifingrar, tá tumlarnir dansa eftir knappunum á fartelefonini og smsmálið titrar ótarnað gjøgnum luftina. Her lekur álvarsliga millum strangan málpolitikk og gerandispraksis – og gjógvin verður bara størri, sigur Ole Wich, sum er sannførdur um, at tað eigur verða pláss fyri hesum slagnum av føroyskum eisini.

---

Visjónstorg:

# Gransking skal raðfestast



*– At ávís øki verða raðfest fremst innan gransking merkir ikki, at onnur skulu útilokast, segði Petur Petersen, formaður í strategibólkinum fyri gransking*

**Ávís granskingarøki skulu raðfestasta hægst. So mugu onnur koma í aðru røð, ljóðaði tað, tá strategibókurin fyri gransking legði síni mál fyri økið fram í farnu viku. Fleiri í visjónstorginum vístu tó á, at ov nógv stýring av økinum kann verða ein vandamikil leið**

VISJÓN 2015
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Hóast visjónstorgið sum heild tók undir við málsetninginum hjá strategibólkinum fyri gransking, menning og nýskapan at neyðugt er við raðfesting innan øki, vóru onkrar ivasamar røddir.

### Raðfesting ikki útilokan

Hesar vístu millum annað á vandan við ov nógvari stýring av økinum á ein hátt, so grundgranskingin ella breiddin á granskingarøkinum kemur at svíða. Nevnt varð, at ov neyv raðfesting kann hava við sær, at dugnaligir granskarar verða leiddir burtur frá økjum, har teir hava sína styrki, og at virðismikil vitan harvið ikki verður gagnnýtt best.

Frá strategibólkinum varð mint á, at raðfesting ikki merkir útilokan av øðrum økjum, og at breiddin á onkran hátt má tryggjast. Hinvegin gjørdi bólkurin greitt, at viðvíkjandi raðfesting er talan í veruleiknum ikki um eitt val, men at gera tað, sum er neyðugt og sum okkara avmarkaða tilfeingi loyvir.

### Mál fyri gransking, menning og nýskapan:

Yvirorðnað hevur strategibólkurin orðað hesa visjón um gransking, menning og nýskapan í Føroyum:

Føroyar eru millum fremstu lond innan gransking, menning og nýskapan. Hesi viðurskifti skulu samskipast soleiðis, at tað almenna og vinna ganga hond í hond innan samskipan og raðfesting. Karmar verða skaptir, sum tryggja, at gransking, menning og nýskapan fáa bestu kor. Fíggjarliga tilfeingið verður stigvíst økt, so tað í 2015 er minst 3 % av bruttotjóðarúrtøkuni.

Orðað eru mál um Bygnað, Høgt raðfest øki, Fígging og úrtøku.

Í høvuðsheitum eru málini hesi:

### Bygnaður

Málið er at samskipa gransking, menning og nýskapan.

Skipaður verður ein bygnaður, (organisasjón) sum tryggjar starvsligar og fysiskar karmar fyri granskarar o.o. Partur av hesum bygnaði fevnir eisini um hægri undirvísing

Bygnaðurin fevnir um tann organisatoriska partin, t.v.s. at øll viðurskifti viðvíkjandi gransking verða útint, íroknað fyrisiting, roknskap, løgfrøði o.a.

Hægri lærustovnar fáa eitt hóskandi tal av phd námsstyrkum á hvørjum ári fyri at tryggja neyðuga útvegan av nýggjum fólki og fakliga menning

Vinnuligar phd verkætlanir og aðrar vinnuligar verkætlanir kunna fáa almennan stuðul

### Høgt raðfest øki

Málið er at tryggja, at gransking, menning og nýskapan fáa so góð kor sum gjørligt, samstundis sum ávís øki, sum vit hava serligar góðar fortreytir í, verða høgt raðfest. Høgt raðfestu økini skulu verða við til at lyfta henda partin av granskingini upp á altjóða støði, samstundis sum onnur natúrlig fylgiøki fáa fyrimun av hesum.

Hægst raðfesta økið er matframleiðsla úr havinum. Onnur høgt raðfest øki eru: Gentøkni, mentan og samskiftisførleikar (mál og KST)

Onnur viðkomandi granskingarøki, sum stuðla undir hægri vælstandi og vælferð, verða eisini stuðlað, treytað av at tey eru viðkomandi.

### Fígging og úrtøka

Málið er, at tað almenna skal fíggja upp til 2% av BTÚ, meðan vinnan og aðrir granskingargrunnar fíggja í minsta lagi 1% av BTÚ. Sett verður í verk ein eftirmetingar- og dygdarskipan, sum skal tryggja, at sum mest fæst burturúr.

**Í strategibólkinum fyri gransking sita:**
Petur Petersen, formaður
Bergur Poulsen
Rúna Hilduberg
Pál Weihe
Danjal Jákup Andreasen